# At lesa upp til barnafótbóltskappingar

Vælkomin til barnafótbólt!

Í dag snýr tað seg fyrst og fremst um **spæligleði**, **felagsskap** og **góðar upplivingar** við liðfeløgunum.

Tá ið børnini í dag fara at spæla dystir, er **endamálið at læra, mennast og savna sær royndir**.

Og tað gera vit best í einum góðum, tryggum og rúmligum umhvørvi, har **øll kenna seg væl**.

Vit vilja minna øll á at vísa **góðan hugburð og liðanda,** bæði á vøllinum og uttanfyri vøllin.

**Vit áskoðarar skulu minnast til, at:**

- Lata børnini spæla og taka avgerðirnar á vøllinum
- Lata venjaran leiðbeina
- Loyva mistøkum - tað er soleiðis vit læra
- Halda ein jaligan tóna og stuðla øllum liðnum
- Virða avmerktu økini, bæði vallir og áskoðaraøkið
- Minnast til, at øll hava rætt til spælitíð

Góðan dyst!